# nnast um Føroyar





Nógvar av myndinum hjá Noomi Riedel eru andlitsmyndir



Noomi Riedel vil ikki bara taka myndir av náttúruni í Føroyum, uttan eisini fólkinum. Hendan myndin er frá einum frítíðarsentri



Eitt summarkvøld á Gærdet, ið er ein býarpartur í Stockholm



## Fakta

**Navn:** Noomi Riedel
**Aldur:** 21
**Fødd:** Stockholm
**Býr:** Stockholm
**Karriera:** Myndakvinna og lesandi

## Fakta

**Navn:** Rasmus Borg
**Aldur:** 22
**Føddur:** Trelleborg í Skåne
**Býr:** Stockholm
**Karriera:** Tónleikari og lesandi

## Hvat vita tey um Føroyar higartil:

*Hvussu nógv fólk búgva í Føroyum?*
Rasmus: 46 000 (næstan rætt - 48.219 Kelda: Hagstova Føroyar)

*Hvussu eitur høvuðsstaðurin?*
Noomi: Torshavn (Rætt - eitt lítið ó manglar bara)

*Hvussu nógvur seyður er í Føroyum?*
Bæði: Tað ána vit ikki (Uml 70-80.000 seyðir)

*Hvussu nógvar oyggjar eru Føroyar?*
Bæði: 18 (Rætt)

*Hvussu eitur løgmaður?*
Bæði: Tað vita vit ikki (Jóannes Eidesgaard)

*Hvat mál er føroyskt nærmast í familju við?*
Bæði: Ivast eina løtu men siga síðani íslendskt og norskt, ið verður talað á Vesturlandinum í Norra (Rætt)